

# STARVSPROFILUR

Leiðari til Visit Vágar

Talan er um eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv á einum vinnuøki í stórari menning.

INNGANGUR ........ 2

UM FERÐAVINNUSAMSTARVIÐ ........ 2

STARVIÐ SUM LEIÐARI ........ 2

Høvuðsuppgávurnar eru at ........ 2

Førleikakrøv ........ 3

Fakliga ........ 3

Persónliga ........ 3

Flokking ........ 3

Arbeiðstíð og starvsstaður ........ 3

# INNGANGUR

Við menningarstovuni Visit Vágar, eru Vága og Sørvágs kommunur saman um at menna ferða- og upplivingarvinnuna í Vágum og Mykinesi, og leita nú eftir einum leiðara til hetta spennandi starvið.

Hesin starvs- og persónsprofilur skal geva eina mynd av starvinum, og tí sum kommunurnar vænta sær av leiðaranum.

Starvs- og persónsprofilurin er grundarlag undir starvslýsingini og viðgerðini av umsóknum, tá mett verður um, hvørt umsøkjarar lúka krøvini, kommunurnar seta til starvið.

Profilurin skal eisini tryggja, at kommunurnar og leiðarin hava eina felags mynd av starvinum og væntanunum til starvið, so at líkindini fyri, at setanin eydnast, eru góð.

# UM FERÐAVINNUSAMSTARVIÐ

Ferðavinnusamstarvið í Vágum og Mykinesi hevur seinastu árini flutt seg frá klassiska gamla háttinum at reka kunningarstovu til at menna og skipa virksemið strategiskt í økinum (ein sonevnd DMO, Destination Management Organizastion).

Samstarvið er skipað interkommunalt í einum samstarvssáttmála ímillum Vága og Sørvágs kommunur.

# STARVIÐ SUM LEIÐARI

Starvið verður skipað við støði í samstarvssáttmála millum Vága og Sørvágs kommunur. Leiðarin vísir til forfólkið í samstarvsnevndini.

Talan er um eitt fjølbroytt og sjálvstøðugt starv á einum vinnuøki í stórari menning. Leiðarin skal arbeiða strategiskt og ítøkiliga: Leiðarin skal í stóran mun leggja ætlanir fram í tíð og sleppur at mynda starvið og framtíðar virkisleistin, men skal eisini leggja ítøkiligar ætlanir og menna og samskipa tiltøk, sum hava við ferðavinnu og upplivingar í økinum at gera. Økið Vágar og Mykines er serstakt í ferðavinnuhøpi við tað, at talan er um bæði útoyggj og part av miðstaðarøki landsins.

## Høvuðsuppgávurnar eru at

- Menna ferða- og upplivingarvinnuna í økinum burðadygt og við tí endamálið, at sum mest av ágóða liggur eftir í lokaløkinum
- Taka stig til, kveikja og leggja lag á at menna nýggjar og verandi tænastur og upplivingar í økinum
- Samskipa ferðavinnuna í økinum, menna tænastuveitarar og gera tey før fyri at lyfta sín lut á professionellan hátt – einsæris og í felag
- Veita ráðgeving til tænastuveitarar, ið tørva ráðgeving og vegleiðing í sambandi við menning og marknaðarføring
- Støðugt dagføra og nútíðargera hættir at marknaðarføra og skapa nýggjar samskiftispallar við marknað, tænastuveitarar og lokaløkið
- Gera kunningarátøk, lýsingar o.a. kunningartilfar

## Førleikakrøv

Umsøkjarar verða mettir eftir fakligum og persónligum førleikum og skulu hava sum flestar av niðanfyristandandi eginleikum:

### Fakliga

- Viðkomandi útbúgving innan ferðavinnu, tænastuvinnu, marknaðarføring ella líknandi
- Royndir at arbeiða við ferðavinnu og samskifti í Føroyum og uttanlands eru ein fyrimunur
- Duga væl at málbera seg skrivliga og munnliga á føroyskum, norðurlendskum og enskum Hava góðan kunnleika til teld og sosialar miðlar

### Persónliga

- Vera forvitin, uppsøkjandi og duga at fanga nýggj rák, og at hugsa sjálvstøðugt
- Hava áhuga fyri lokala lívinum, duga at lurta og hava virðing fyri mentanini, virðunum og geradislívinum í økinum
- Vera skapandi, ágrýtin og duga at síggja menningarmøguleikar
- Við jaligum, kveikjandi lyndi leggja lag á arbeiðið at menna nýggjar tænastur og upplivingar, sum eru fremjandi fyri vinnuna og tey, sum búgva í økinum
- Vera fyrikomandi, og á hjálpsaman hátt megna at samstarva og samskifta við nógvar ymiskar málbólkar
- Duga at fáa eyga á nýggjar og øðrvísi hættir at marknaðarføra og fremja kunning og samskifti við tænastuveitarar og marknað
- Vera málsøkin og miðvís/ur í mun til markna og fáa sum mest burtur úr

## Flokking

Starvið sum leiðari veður flokkað samsvarandi sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið/Fíggjarmálaráðið.

## Arbeiðstíð og starvsstaður

Starvið er fulla tíð. Meginparturin av arbeiðinum er í vanligari arbeiðstíð, men leiðarin skal eisini vera tøk/tøkur til at arbeiða skiftandi og ólagaligar arbeiðstíðir.

Starvsstaðurin er á kommunuskrivstovuni í eini av kommununum.

Roknast skal við nakað av ferðing í økinum.